DAGSINS MEINING

Afturvirkandi demokrati

Eitt løgið hugtak hevur nú sæð dagsins ljós í føroyskum politikki. Tað er afturvirkandi demokrati. Tað tykist sum um, at tað er í lagi at fremja tiltøk, ið fólkið ikki vil fremja, tí tey taka helst undir við tí, tá hesi tiltøk eru framd.

Hetta er í hvussu so er fatanin, ein fær, tá varaløgmaður fyrr í vikuni greiddi frá ætlaðu yvirtøkunum av løgreglu og rættarskipan. Tá hann í SvF var konfronteraður við seinastu meiningarkanningini, ið vísti, at stórur meiriluti var ímóti at yvirtaka hesi málsøki í næstu framtíð, so nýtti varaløgmaður blokkniðurskurðin sum dømi, og vísti á, at næstan eingin vildi hækka blokkin aftur. Nú er ein meiningarkanning av hesum slagnum altíð vegleiðandi, men tá ið marginalar eru so stórir, sum til dømis viðvíkjandi yvirtøku av løgreglu og rættarskipan, so er hetta í hvussu so er ein vegleiðing, ið politikarar eiga at hugsa um. Men ansast má eftir, hvussu úrslitini verða tulkað.

Hevur varaløgmaður grein í sínum máli viðvíkjandi blokkniðurskurðinum? Nei, tí næstan eingin vil ta mannminkandi støðu, at føroyingar fara niður aftur til danir at biðja um hækkaðan blokk. Hetta nýtist ikki at merkja, at øll halda, at tað var rætt at skera blokkin so ógvusliga, sum gjørt varð. Demokrati merkir fólkastýri í nútíðini og kann ikki vera við afturvirkandi kraft. Eru føroyingar ímóti at yvirtaka løgreglu og rættarskipan nú, so má bíðast. Tað ber ikki til at yvirtaka hesi øki uppá tað, at fólk helst fara at taka undir við tí, aftaná tað er gjørt.

Útyvir at løgregla og rættarskipan eru øki, ið krevja sera stóra umhugsan, áðrenn pilkað verður ov nógv við tey, so er ilt at skilja, hví hesi mál verða lýst, sum um ætlanin er at yvirtaka tey í hesum valskeiði. Samgonguskjalið sigur greitt, at yvirtøkurnar skulu fyrireikast í hesum valskeiði. Altso eingin yvirtøka.

Hetta mál var eitt av málunum, ið gjørdi, at Javnaðarflokkurin og Tjóðveldisflokkurin vóru ósamdir um við seinastu samgongusamráðingar, og gjørdist tað ein av høvusorsøkunum til, at Javnaðarflokkurin ikki kom við í samgonguna, tí hann ikki helt tíðina verða búna til at yvirtaka løgreglu og rættarskipan í hesum valskeiði. Heilt marghátthligt gjørdist tað so, tá samgonguskjalið, ið Tjóðveldisflokkurin fekk við Miðflokkinum sum samgongufelaga, ikki innihelt yvirtøkuna av løgreglu og rættarskipan.

Vónandi verður lurtað eftir borgaranum, áðrenn nakað drastiskt verður gjørt viðvíkjandi løgreglu og rættarskipan. Nú, væl at merkja og ikki aftaná yvirtøkurnar eru framdar.

Annars kundi eisini verið hugaligt at fingið at vita, hvar hinir samgonguflokkarnir standa í hesum máli. Vónandi fer komandi tíðin at varpa ljós á hetta.

Sosialurin

VIÐMERKINGAR

Ríkisfelagsskapurin heimsins besta skipan (annar partur)

Kaj Leo Johannesen
Sambandsflokkurin

Tað er gott at búgva í Føroyum, og tað er gott at verða í ríkisfelagsskapi saman við Grønlandi og Danmark.

Umdømi og figgingarmøguleikar er tengt at okkara kredittvirði í mun til umheimin.

Landstýrið hevur sett sær fyri, at gjalda ein part av uttanlandsskuldini, við at upptaka nýggj brævalán at gjalda við, hettar fyri at spara rentukostnaðir, og áðrenn at hava kannað møguleikarnir fyri at fáa rentu niður á núverðandi láni.

Fyri at gera hetta, ætlar Landsbankin saman við Nordea Bank Danmarka A/S, Kaupthing Føroyar, Føroya Virðisbrævameklarafelag og P/F og Norðoya Sparikassa at útskriva nýggj brævalán.

Tá vit so lesa inni á heimasíðuni hjá Landsbankanum treytir fyri láni av hesum slag, so leggja vit til merkis at sum í øðrum avtalum, so eru nakrar treytir, og nakrar uppsagnarfreistir frá báðum síðum, hettar er sjálvandi ikki óvanligt.

At útgevarnir av lánsbrøvunum tilskilað sær rætt at uppsiga brævalánið, um so er at kredittvirði hjá lántakara t.v.s Føroya Landsstýri verður "væsentlig forringet" og tað verður ítøkiliga nevnt at "kreditvirði hjá Føroyum versnar um Føroyar fara úr ríkisfelagsskapinum.

Allir føroyingar kunnu fara inn á heimasíðu hjá Landsbankanum og lesa treytir fyri hesum láni har stendur orðarætt í stykki 2.9 undir punkt soleiðis.

D) Hvis Landstyrets muligheder for at opfylde sine forpligtelser i forbindelse med "Obligationslånet" bliver væsentlig forringet, eksempelvis som følge af en udtræden af Rigsfællesskabet med Danmark.

Aftur eitt dømi at okkara kredittvirði innan fyri ríkisfelagsskapin er størri enn uttanfyri, sum avleiðing merkir hetta, at vit í ríkisfelagsskapinum hava størri fíggjarligt frælsi.

Fyrst skal vælferðin og rættartrygdin ofrast!

Johan Petersen

Bæði løgmaður og varaløgmaður hava seinastu vikuna endurtikið, at fólkaatkvøða skal verða, um loysing skal takast ella ikki. Men ikki fyrr enn allar fíggjarligar bindingar eru burtur og heimastýrislógin tømd! Men tá er skaðin longu hendir!

Seinastu vikuna hava bæði løgmaður og varaløgmaður endurtikið í fjølmiðlunum, at fólkaatkvøða skal haldast, um loysing skal takast ella ikki. Løgmaður sigur, at fyrst skulu allar fíggjarligar bindingar Føroya og Danmarkar millum burtur, og varaløgmaður sigur, at heimastýrislógin fyrst skal tømast!

Dýrar yvirtøkur

Men hvat merkir hetta í veruleikanum? At allar fíggjarligar bindingar fyrst skulu burtur kann ikki merkja annað enn, at øll mál, sum ikki beinleiðis eru tengd at loysingini, fyrst skulu yvirtakast við teimum útreiðslum, hetta førir við sær. Tað sama merkir ein tøming av heimastýrislógini.

Longu nú síggjast avleiðingarnar av blokkniðurskurðinum, sum ikki eingang stavar frá veruligum yvirtøkum, men bert frá yvirtøku av kostnaðinum av umsiting, sum vit í veruleikanum høvdu frammanundan.

Fíggjarlógin hongur ikki saman

Stríð er í samgonguni, tí fíggjarlógin ikki fæst at hanga saman og tað í eini tíð, har vit framvegis eru á búskaparliga aldutoppinum:

- tey gomlu fáa ikki ta røkt, teimum tilkemur
- skorið verður í stuðlinum til uppihaldspening
- barsilsskipanin verður amputerað
- Sjúkrahúsini fáa ikki nóg mikið av peningi til viðlíkahald
- sjúkraviðgerð uttanlanda verður avmarkað
- apopleksi- og afasiraktir sjúklingar fáa ikki nøktandi viðgerð
- kommunurnar fáa álagt alt fleiri ábyrgdarøkir og í fleiri førum uttan endurgjald

Forkoma vælferðini og rættartrygdini

Alt hetta merkir, at vælferðin longu er skerd munandi, og framhaldandi yvirtøkur koma skjótt at forkoma allari vælferð, vit eru von við, og sum tey allarflestu av okkum vilja varðveita. Og alt fleiri og fleiri tekn eru í sól og mána, at samgongan ikki fýrir fyri at skerja rættartrygd okkara, so vit at enda sita eftir við ongari vælferð og ongari rættartrygd.

Tá ið henda støða er ímomin, ja tá skulu vit sleppa at siga okkara hugsan, um vit vilja hava loysing ella ikki!

Virða ikki fólksins vilja

Sig mær, hvat billa løgmaður og varaløgmaður sær inn? Virða teir ikki Føroya fólk og tess vilja? Teir tordu jú ikki at hava fráboðaðu fólkaatkvøðuna av ótta fyri, at fólkið skuldi siga sína hugsan og kolldøma hesa vanlukkuætlan. Og nýggjasta veljarakanningin átti at fingið onkra klokku at ringt hjá hesum báðum garpunum, so teir viðurkendu, at teirra ætlan ikki hevur hald millum Føroya fólk.

Vóru teir tað minsta at sær komnir, spurdu teir fólkið fyrst, um vælferðin og rættartrygdin skuldi ofrast á fullveldisaltarinum ella ikki. Hetta hevur Sambandsflokkurin m.a. skotið upp, men nei.

Bert Sambandsflokkurin kann steðga galskapinum

Tí er bert at vóna, at løgtingsval verður útskrivað, áðrenn sitandi samgongu eyðnast at jarðleggja okkara samfelag, og at Sambandsflokkurin fær ta neyðugu undirtøku, ið skal til fyri at steðga galskapinum. Javnaðarflokkurin sigur seg jú hava yvirhálað fullveldissamgonguna, so haðani er ikki nógv at vænta sær.

Sosialurin

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Figgjarleiðari: Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad
finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo

Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

Myndamenn:
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

Sosialurin í Norðoyggjum:
Postmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
Sosialurin í Suðuroy:
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
Sosialurin í Eysturoy:
Postmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo
Sosialurin í Vágum:
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

Uppseting/prent:
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin
Avgreiðsla:
Mán.-fri. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Fríggjadagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framihjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Innsent tilfar
Fult navn skal vera undir innsendum tilfar. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.

VIÐMERKINGAR

Løgtingið samtykkja útigongubann fyri børn og ung ?

Eyðgunn Samuelsen
formaður í sosialu nevnd Klaksvíkar Býráð

Í vikuni hevur Rúna Sivertsen skotið upp, at løgtingi skal samtykkja eina lóg ið bannar børnum og ungum at ganga úti um kvøldið, undantikið tá ið tey fylgjast við vaksnum fólki.

Hví er hetta ikki eitt gott hugskot

Hetta uppskot reisir ein rættuliga grundleggjandi spurning, hvør skal hava ábyrgdina av børnunum: myndugleikarnar ella foreldrini. Í minum hugaheimi er ongin ivi, foreldrini hava og mugu framhaldandi átaka sær ábyrgdina av børnunum. Gongdin seinnu árini hevur verið, at alt ov nógv av ábyrgdini verður løgd til ymsar stovnar, eitt nú fáa starvsfólk á dagstovnum meira og meira ábyrgd í samband við at uppdraga børnini og skúlarnir fáa eisini meir og meir tann sama leiklutin. Henda gongdin er skeiv og má vendast. Hetta skal *ikki* skiljast so, at eg haldi kvinnurnar skulu heimaftur at taka sær av børnunum, tvørturímóti ábyrgdin av børnunum má gerast meira felags fyri bæði foreldrini, enn hon er í dag.

Hvat er trupulleikin

Rúna Sivertsen sigur, at tað at børn ganga seint úti lættari elvir til at tey koma út í kriminalitet. Hetta er bert partvíst rætt, tí vit kunnu eisini spyrja, hví ganga summi børn seint úti um kvøldið ? Orsøkin kann vera, at tey ikki hava tað so gott heima, at onkrir trupulleikar eru heima. Trupulleikarnir heima og tann vantandi barlastin ið hesi børn fáa við sær út í lívið, kann viðvirka til at tey hava ilt við at skilja, hvat er rætt og skeivt og tí kanska gera okkurt kriminelt. Hesin trupulleiki verður ikki loystur við at ein løgreglumaður leiðir børnini til hús. Hetta er ikki at taka fatur um veruliga trupulleikan (heima við hús) men roynd at steðga avleiðingunum av trupuleikunum (at børn ganga úti) og tað hjálpir so onki uppá verðuliga trupulleikan.

Verja børn ímóti foreldrum

Tað er ikki neyðugt at samtykkja eina lóg aftrat fyri at verja børn ímóti foreldrunum. Vit hava longu eina lóg til hetta endamál nevniliga "lov um børneforsorg". Bert syrgiligt at samgongan hjá Rúni nú í 3 ár ikki hevur megnað at fingið samtykt alneyðugar ábøtur á hesa lógina, so børnini vera betur vard enn í dag.

Hevði barnaverndin, lærarar og námsfroðingar og onnur ið hava fráboðanarskyldu fingið betur karmar at arbeitt undir so vóru vit komin langt. Í dag hevur barnaverndin alt ov vánaligar karmar til at gera eitt uppsøkjandi og fyribyrgjandi arbeiði fyri at verja børnini. Tey fakfólk, ið hava fráboðannarskyldu, áttu at fingið meira vitanútbúgving so tey kundu fanga trupuleikar skjótari.

Eisini mugu øll vit onnur broyta hugburð og tora at siga frá á rætta stað um vit siggja at eitt barn ikki hevur tað gott.

Ongar lættar loysnir

Hetta er ein verðuligur trupuleiki, ið Rúna Sivertsen her tekur fram, men tíverri eru ongar lættar loysnir, ið muna. Um tingið ger eina lóg, so kunnu politikarnir siga, at teir hava so gjørt okkurt og síðan sleppa trupuleikarnir at liva víðari og teir hava onga ábyrgd meira. Tað er eisini trupult og tungt hjá fleiri foreldrum at hava ein aktivan leiklut í samband við teirra børn, her kundi avvarðandi landsstýrismaður farið inn, og roynt at komi við nøkrum familjupolitiskum átøkum, ið bøtti um henda trupuleika. Lóg um útgongubann loysir so ongan trupuleika, men skavar kanska heldur útyvir hann.

Suðuroy, ikki Suðuroyar norðara og sunnara helvt

Finnleif Guttesen
býráðslimur á Tvøroyri

Oyggin er ikki Kypern, við einum fólki sum býr í norðara helvt og einum sum býr í sunnaru helvt. Hetta er ørvitistos, og øll sum tosa og skriva soleiðis um okkara vøkru oyggj, skapa bert ósemju og er hetta stór synd og skomm.

Hesin hugburður um suður og norð, skapar einki gott, menn er éin megin orsøk til, at ikki størri framburður er í oynni.

At tora

Tað áhaldandi klandri um t.d. arbeiði, kenninga politikkurin um hvør skal gera tað, hvar skatturin skal gjaldast, ger alt dýrari og er bert til skaða fyri Suðuroy.

Politikararnir mugu torað at broyta meining og siga, at nú er nokk, vit skulu samstarva fyri allari oynni, ikki bert fyri norðara ella sunnaru helvt.

Fyri at koma burtur úr hesum keglinum er ein gongd leið, at allar kommunurnar í Suðuroy samstarva so mikið væl, at einki er til hindurs fyri, at leggja saman til eina kommunu tá ið tíðin er búgvin.

Umsiting í Hov

Ein felags umsitingarbygningur, sum kommunurnar møguliga saman við tí almenna og privata vinnulívinum letur byggja í Hov´s dali, um tað er í Hov´s ella Porkeris kommunu er líkamikið, hevði verið eitt ítøkiligt stig og signal úteftir, at nú standa vit saman sum ein maður.

Øll sum arbeiða í teimum ymisku umsitingum ídag høvdu fingið eitt nýmótans arbeiðsplass við øllum hentleikum, meðan fjarstøðan frá Sumba ella Sandvík til hetta nýggja arbeiðsplássi hevði verði lítið at tosa um.

Við kommunalum, almennum og privatum fyritøkum í hesum bygningi, høvdu vit fingið eitt arbeiðsumhvørvið, sum kundi fingið fólk suður til okkara vøkru oyggj, at arbeitt.

Politikararnir

Vit politikarar mugu tora at broyta meining og hugsa nýtt.

Hetta, at tað ikki letur seg gera, er tann sama grundgevingin, sum embætisfólk í Tórshavn hava tá ið okkurt skal leggjast uttanfyri Tórshavn og tí grundgevingini havi eg so ongantíð tikið undir við.

tankadrasl ið mettar seg av tigandi spurningum

»hvar er lóg og rættur?«
»nær fer sólin ni?ur?«
skal hon síggjast aftur

meiningin tú tigur

brennur ljósins viti

høgt er millum fjalla
hav tú halga ritið
síðstu dagar halla

enniblonk fer aldan

sleingist millum kletta

seggur átti baldan

virðið varð hins metta

runar lívsins kvæði

inni móti landi

vaknar annað lagið

brennimerkt av gandi

soleiðis ber tíðin

brá av tí sum kemur

tú sum vart so íðin

fylti mál á tremur

og tú hugsar um hon

meinti tað hon segði

áðrenn fyri summum

grundin lá á vegi ˆ

sleingir ljósins viti

ljós til allar bátar

her sum eg nú siti

kinnar eru vátar

stjørnuherur allur

leggur at tær minnir

ein so høvurhallur

sleiskast minnum kvinnur

friðurin við dvølir

seinir koma tankar
alt ið grundin bølir
hoyr at hjartað bankar

inni millum húsa

ljómar nú ein songur

meðan vindar súsa

út á hav og longur

brotið uppúr nýggjum

lagið mentist meira

sólin yvir skýggjum

mannabørn man hoyra

ljótar lívsins lygnir

lova loyndum linna

speiskar eru tignir

vinaskaran tynna

skøkjan rend á bálið

hon jú hevði syndað

mist hon hevði málið

tí hon læt sær lynda
bati allur bøtir
roykilsi upp stígur
allar tínar løtur

kenna tað ið líður

kenn mær lívsins leikir
talvið skal eg leika
tó vit eru veikir
valdi guð tað veika
inniligir tankar

koma ljósir higar

hjartað enn tó bankar

drottin tankar vigar

ljósið kom ei aftur

myrkrið eigur hjartað

og so nakkafattur

dvølji eg tað svarta

hinumegin leiðir

síggjast kanska aftur
tit sum eru breiðir
vinaskarin tættur

Christyan Fróði Djurhuus

øðrumegin 13.11.03.

Til Eiðis bygdaráð

Dan Kruse Thomsen
Svínáir

Eg vil heita á Eiðis bygdarráð um at fáa meira gjørt her suðuri í Svínáum, so vit sum borgarar í hesi bygd eru líkastillaði við onnur í Eiðis kommunu. Her hugsi eg serliga um ferðsluviðurskiftini sum eru út av lagi vánalig. Dagliga eru tað nógvir bilar, sum við alt ov nógvari ferð koyra ígjøgnum Svínáir, og havi eg sjálvur næstan um at verið yvirkoyrdur av skilaleysari koyring. Við vegforðingum (bumpum) og skeltum, sum vísa mest loyvdu hámarksferðina, hevði verið tað einasta, sum hevði hjálpt um hetta. Oman til keiðkið er einki gøtuljós og eftir bygdavegnum eru bert 6 gøtuljós og er tað bæði ótrygt og vandamikið at ganga úti um kvøldið, tí vegurin er illa upplýstur. Her í Svínáum hevur rætt og slætt onki verið gjørt í nógv ár og er hetta ikki meira enn eitt rímuligt krav fyri, at fólið her kann støðast og bygdin mennast.

Hetta er bert ein spurningur um at verða líkastillað við onnur í somu kommunu.